# Sølufólk
## Til Timburdeildina

Vit sóknast eftir einum sølufólki til Timburdeild okkara í Tórshavn at byrja sum skjótast ella sambært nærri avtalu.

Vit vilja bjóða tær eitt starv í einum spennandi og skjóttvaksandi virkisøki innan bygging.
Starvið fevnir sum høvuðsøki um tilboðsarbeiði, har arbeitt verður við bæði størri og smærri projektum. Tú kemur eisini at vera ein partur av sølu og innkeypi sum heild.
Tú skalt saman við starvsfelagum tínum verða við í tí støðugu menningini av handli okkara, har vit seta tænastu og góðsku í hásæti.

Vit vænta at tú:

– hevur hollan kunnleika til byggivinnuna (Útbúgving innan byggivinnuna hevur fyrimun)
– hevur kunnleika til EDV á brúkarastøði
– ert fyrikomandi og útatvendur
– ert nærlagd/ur og røkin
– vísir vilja at samstarva við onnur

Hevur tú áhuga í handli innan byggivinnuna, og kanst liva upp til omanfyri nevndu eginleikar, kanst tú senda okkum eina umsókn saman við prógvum og ummælum.

Umsóknin skal sendast til:
**P/f Havnar Timburhandil**
**Heykavegur 4**
**Box 3038**
**FO-110 Tórshavn**
**Att: Jógvan Jørgensen**

**Freistin at søkja er 16. mars 2001**

Hevur tú spurningar, kanst tú seta teg í samband við Jógvan Jørgensen ella Jan á Argjum á tlf. 31 12 50

**P/f Havnar Timburhandil**

HT TILFAR

# Savnslærari til Føroya Fornminnissavn

Starv sum savnslærari á Føroya Fornminnissavni er leyst at søkja. Starvið er fulla tíð í 2001 og treytað av játtan eisini seinni.

Savnslærarin stendur fyri upplýsingarvirksemi savnsins og hevur pedagogisku ábyrgdina av og dagligu umsjónina við framsýningunum. Hann skal leggja til rættis og seta upp serframsýningar og stíla fyri savnsvitjanum, serstakliga hjá skúlaflokkum. Savnslærarin leggur til rættis undirvísingartilfar og annað upplýsingartilfar í sambandi við virksemi savnsins, m.a. á KT-økinum, og stendur fyri tíðindatænastuni.

Áhugi fyri Føroya søgu, skapandi gávur, estetiskur ansur og pedagogiskt hegni eru fortreytir, somuleiðis góður kunnleiki til føroyskt mál. Tann, ið settur verður, skal hava læraraprógv ella BA-prógv í mentanarsøgu ella søgu ella aðra hóskandi útbúgving. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarin hevur gott innlit ella áhuga í kunningartøkni.

Løn og setanartreytir sbrt. sáttmála millum avvarðandi fakfelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Andras Mortensen, savnvørð, tlf. 310700.

Umsóknarfreistin er 28. februar 2001 kl. 9.00.

Skrivligar umsóknir við ævilýsing (CV), avriti av próvskjølum, viðmælum og øðrum viðkomandi skjølum skulu sendast til

**Føroya Fornminnissavn**
P.O. boks 1155
110 Tórshavn

# Hjálparfólk til teldudeildina

Søkt verður eftir hjálparfólki til teldudeildina á Fiskirannsóknarstovuni.

Arbeiðið er at stuðla teldunýtarunum (uml. 30) á stovninum við vanligu egintelduforritunum (9X/2000) og at seta upp nýggjar og gamlar teldur. Seinni, sum evni og áhugi er til, verður arbeiðið meira avbjóðandi við forritan og kervisstýring.

Umsøkjaranum nýtist ikki nakra formella útbúgving, men neyðugt er at duga mest nýttu forritini (Word, Excel, Access og powerpoint). Eisini er gott, um tann, ið settur verður, hevur eitt sindur av skili fyri, hvussu ein egintelda er sett saman.

Løn sambært avtalu millum Føroya Landsstýri og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir skulu vera Fiskirannsóknarstovuni í hendi innan 1. mars 2000.

Fyrispurningar kunnu setast Leon Smith ella Rúna N. Vilhelm á tlf. 315092.

**Fiskirannsóknarstovan**

# Nýtt sminkuskeið

Spennandi og fjølbroytt sminkuskeið verður í Fuglafjarðar skúla leygardagin 3. mars.

Skrá:
1. Teknikkur
2. Sjónleikarasminka
3. Klovna- og barnasminka

Skeiðsleiðari: Elin Madsen

Tilmelding og nærri kunning á tlf. 445115.

**Fuglafjarðar Kvøldskúli**
Tlf. 444087

# Giktafelag Føroya

Aðalfundur felagsins verður í MBF húsinum leygardagin 10. mars 2001 kl. 16.00.

Skrá samb. lógum felagsins.

Á skránni verður eisini fyrilestur og framsýning hjá »Ungt Virki« av Ull teppum/undirlag til seng-ur.

Sí lýsing í Lýsingartorginum seinni.

**Nevndin**

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo



LIONS INTERNATIONAL

# Arliga »Giljanestiltakið«

**sunnudagin 25. februar.**

Tað árliga Lions tiltakið verður sum vant aftur í ár.

Mattombola, loppumarknaður, fiskibrunnur, tombola, 21-spæl, skjóting, tunnusláing, bóltspark o.a.

Eydnuhjól við nógvum góðum vinningum, eisini heimagjørdir lutir.

Eivør Pállsdóttir syngur og »Upp og Tá« sýnir fram dansir.

Møguleiki er at keypa fr. hogdogs og pizza.

Lutaseðlarnir verða drignir kl. 23.00.

**Tiltakið byrjar kl. 16.00.**

Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lions Club Vágar**

# Leiðari til oljudeild

Við tí vaksandi virksemi, sum hevur tikið seg upp í sambandi við leiting eftir olju undir Føroyum, tørvar okkum eitt fólk til at taka sær av samskiftinum við oljuvinnuna.

Arbeiðið verður í stóran mun at selja til oljuvinnuna og at røkja sambandið við hana og hava ábyrgdina av at vøran, sum vit lata av hondum, lýkur tey krøv, ið sett verða.

Til starvið tørvar okkum ein persón, ið hevur góðar royndir frá praktiskum arbeiði, t.d. sum yvirmaður í sjóvinnuni – møguliga við supplyskipi – men aðrar hóskandi royndir kunnu eisini brúkast.

Tann rætti persónurin hevur góðan málsligan førleika, serstakliga í enskum, er hugaður at selja, dámar væl at hava við fólk at gera og at arbeiða í einum umhvørvi, har nógv er at gera.

Starvið skal setast skjótast til ber, men bíðast kann eftir rætta persóninum.

Løn sambært avtalu.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 7. mars 2001. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til John Poulsen, stjóra.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**P/F Vónin,**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 444246 · fax 444579
e-mail: info@vonin.com

**Føroya Fornminnissavn**

# Avloysari fyri savnvørð í fornfrøði

Á Føroya Fornminnissavni er eitt starv sum avloysari fyri savnvørðin í fornfrøði leyst at seta sum skjótast og fram til 31. juli 2001.

Savnvørðurin skal umsita fornfrøðiliga arbeiði.

Umsøkjarin skal vera útbúgvin fornfrøðingur við kunnleika til føroysk viðurskifti og føroyskt mál.

Løn og setan eftir galdandi sáttmála millum Magistarafelagið og Fíggjarmálastýrið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Kirstin Eliasen, vikarierandi landsantikvar á tlf. 310700.

Umsóknir við CV og avriti av próvtøkuskjølum skulu vera savninum í hendi í seinasta lagi 26. februar 2001 og verða sendar til:

**Føroya Fornminnissavn**
Hoyvík
Postboks 1155
110 Tórshavn

# Pedagogur

Søkt verður eftir:

1 pedagogi, 30 tímar um vikuna, til eina stovu við 18 barnagarðsbørnum skjótast til ber, fram til 15. novembur 2001 vegna barnsburðafarloyvi.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, sum er normeraður til 42 barnagarðsbørn, 12 vøggustovubørn, 7 pedagogar, 4 hjálparfólk og 4 stuðlar.

Lønarfl. 11/13 sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi 12. mars 2001.

**Kongshavnar Barnagarð og Vøggustovu**
Heiðavegur
Postboks 119
Fo-600 Saltangará

# Frá Fótbóltsdómarafelag Føroya

Aðalfundur felagsins verður á Hotel Føroyum fríggjadagin 2. mars kl. 22.15.

**Nevndin**

# Dupulthús við Villingardalsvegin til leigu

Húsini eru í góðum standi, í tveimum hæddum og við sera góðum útsýni. Hvør hæddin er uml. 63 m².

1 hædd: Forstova, bryggers, tvey kømur og eitt stórt baðiverilsi.
2. hædd: Arbeiðsligur køkur/stova & stórt hjúnarúm.
Fittligur havi er um húsini.

Prísuppskot: 5.500- 6.000,- pr. mðr. + ljós og hita.
Leigusáttmáli fyri eitt ella tvey ár.

Skriva til:
**Sosialurin,**
Box 76,
110 Tórshavn,
Bill. mrk. 21.02.

# Eykaaðalfundur

Eykaaðalfundur í P/F Smyril Line verður hildin á Hotel Føroyum tann 10. mars 2001 kl. 14.00 við hesi dagsskrá:

1. Val av orðstýrara
2. Gjøgnumgongd av grannskoðaðum roknskapi fyri ár 2000
3. Broyting av viðtøkunum, herundir: javnstilling av verandi partapeningi við kurs 300 heimild til nevndina at tekna upp til kr. 300.000.000,- í nýggjum partapeningi avmarking hjá einstøkum eigara at eiga meira enn 40% av partapeninginum
4. Val av nevnd

Talan er um framhald av eykaaðalfundi tann 9. febr. 2001, har omanfyrinevndu samtyktir skulu endaliga staðfestast samb. §10 í viðtøkum felagsins.

Atkvøðuseðlar til fundin skulu avheintast á skrivstovu felagsins í Jónas Broncksgøtu 37 í døgunum 5. og 6. mars 2001.

Atkvøðuseðlar verða bert útflýggjaðir móti fyrivísan av partabrøvum.

**P/F SMYRIL LINE**
Postboks 370
110 Tórshavn

# NATEN 1-2-3

Við naten fáa tygum øll natúrlig samansett vitamin-mineral-enzym tygum tørva dagliga.
**Pollen Propolis Royal Gele.**

*Ringið og vit senda.*

**Naten søla**
**Tlf. 318649**